# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*





*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Z

Isabel Allende, *El Zorro, Comienza la leyenda,*
Umsett: Iben Hasselbalch,
En legende fødes,
Gyldendal, 2005

*Isabel Allende*



Í bókini sigur Isabel Allende dramatisku søguna um spansk-indianska drongin, sum vaks upp í Kalifornia, og hvørs eydnudjór er revurin: el zorro. Sum 15 ára gamal verður hann sendur til Barcelona at stríðast móti harðræðinum hjá Napoleon. Nøkur á seinni kemur ungi maðurin heim aftur til eitt Kalifornia, tyngt av harðskapi, kúgan og órættvísi. Restina av søguni kenna flestu (smá) dreingir. Zorro lat seg í svørtu hálvmaskuna, gjørdist hetja, og heimskent vørumerki.

Minni alment er tað, at nýggja bókin hjá Allende er ein bíløgd uppgáva frá eigararnum av vørumerkinum Zorro. Tað kann man so meina um, hvat man vil, men bókin hóskar í grundini væl inn í ritverkið hjá Allende. Hon er orðarík, fantasirík og søgan gongur við rúkandi ferð í onkrum slagi av new age magiskari realismu, sum eftirhondini er vorðið vørumerkið hjá Allende. Lesarin verður undirhildin í besta dreingjabókastíli frá byrjan til enda. Verri er tað við høvundanum, sum móti endanum viðgongur, "at frá einum skaldsligum sjónarmiði er lítil spenningur í slíkum søgum, sum hoyra barndóminum til. Tí børn eru, við fáum undantøkum, eitt sindur keðilig."

Slíkar viðmerkingar geva frásøgnini ein humoristiskan dám, men fáa vørumerkið hjá Allende at síggja heldur ivasamt út.




# Bøkurnar og eg



*Bókin* Det dyrebare liv, *brøvini hjá Jørgen-Frantz Jacobsen til William Heinesen, hugtók Urd Johannesen so nógv, at hon fekk Sunleif Rasmussen at skriva tónleik til eitt av brøvunum*

### Urd Johannesen, fulltrúi í Mentamálaráðnum

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
- Eg lesi *Angels and Demons* eftir Dan Brown, sama høvund, ið skrivaði nógv umtalaðu bókina *The Da Vinci Code,* sum eg eisini havi lisið. Mær dámar væl bøkur, sum geva innlit í nýggjar verðir og vitan, men sum samstundis fortelja eina góða søgu. Báðar bøkurnar seta spurningar við rættiliga rótfestar hugsjónir í okkara mentan og søgu, og hetta haldi eg er spennandi, óansæð um eg eri samd ella ikki við tí, ið verður ført fram.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
- Skal eg velja eina, má tað verða *Det dyrebare liv*, brøvini hjá Jørgen-Frantz Jacobsen til William Heinesen. Kanska bókin "fann" meg í røttu tíð, men eg havi sjáldan verið so bergtikin av eini bók, hon tyktist vera ein opinbering. Vanliga lesi eg eina bók, leggi hana frá mær og fari víðari til ta næstu. Men hesa bókina havi eg vent og lisið nógvar ferðir. Hon er lívsjáttandi og nemur við nógvar ymiskar kenslur. Tónleikur hoyrist næstan á hvørjari síðu. Hon gav mær so nógvan íblástur, at eg kastaði meg út í eina stóra verkætlan og fekk Sunleif Rasmussen at skriva tónleik til brævið "Nytårsouverture". Ein onnur bók, ið hugtók meg nógv, er *The Pillars of the Earth* eftir Ken Follett. Hon hevur nakað av tí sama í sær, sum bøkurnar eftir Dan Brown, har ein ørgrynna av áhugaverdum fakta upplýsingum eru tvinnaðar inn í eina ótrúliga góða søgu. Meðan eg búði í London, las eg tríverkið hjá Philip Pullman, og hetta eru spennandi og tankavekjandi bøkur. Tann síðsta, ið eg havi hug at nevna, er *The Chosen* eftir Chaim Potok, sum handlar um vinskap ímillum tveir átrúnaðarligar mótpartar – nakað, ið má sigast vera rættuiliga viðkomandi í dag.

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*
- Pápi mín plagdi at lesa fyri okkum børnum, áðrenn vit sovnaðu, og hetta er nakað, ið eg minnist sera gott aftur á. Eisini minnist eg sera væl, tá okkara fitta klassalærarinna las bókina Jugga fyri okkum í 1. ella 2. flokki. Mær tókti so synd í honum, tí hann var sera fátækur, og klæðini vóru vaskað í Ganges-ánni. Fyrstu bókina, eg minnist, at eg sjálv las, vóru bøkurnar um italsku børnini Giuseppe og Mariu. Heilt upp til 10. flokk høvdu vit klassalærara, ið las bøkur fyri okkum. Hetta eru nakrar av bestu løtunum, eg havi at minnast aftur á frá skúlatíðini.

*Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*
- Eg vildi ynskt, at eg hevði tol til at lesa verkini eftir William Shakespeare, men onkursvegna tykist málið óatkomiligt, tá ein ikki hevur fingið tað borðreitt á skúlabonki. Annars eru nógvir aðrir klassikarar, ið eg kundi hugsað mær at lisið, men við smábarni í húsinum, eigi eg ikki tíðina í løtuni. Hugsi viðhvørt um høvundan Frank McCourt, sum í bókini *T'is* fór grátandi út úr bókasavninum í New York, tá tað gekk upp fyri honum, at tað vóru túsundtals bøkur, ið hann aldri fekk lisið, tí lívið er ov stutt.

*Hvørja bók ynskir tú tær í jólagávu?*
- Móðurmálsorðabókina. Heilt einfalt, tí eg vil duga betur føroyskt. Tað er eingin loyna, at nógv tær flestu bøkurnar, ið eg havi lisið, hava verið á fremmandamáli. Tá ið eg var ung, helt eg, at úrvalið av føroyskum bókum var rættiliga avmarkað. Hetta er nógv broytt, og eg gleðist yvir allar barna- og ungdómsbøkurnar, sum eru á føroyskum í dag. Men hjá mær hevur úrslitið verið, at eg ikki eri so stinn í føroyska málinum, sum eg kundi ynskt mær.

## Hvat nú, um ...

Philip Roth, *The plot Against America,* Houghton Mifflin Co., 2004



*Philip Roth*

Endamálið við øllum skaldskapi er at ímynda sær "Hvat nú, um ...", segði amerikanski rithøvundurin Philip Roth í eini samrøðu herfyri.

Í síni nýggjastu skaldsøgu *The Plot Against America* ímyndar Roth sær, at heimsgitni flogskiparin og jødahatarin Charles A. Lindbergh vann amerikanska forsetavalið í 1940. Úrslitið av valinum fær ræðsluna at krúpa inn um dyrnar hjá familjuni hjá Roth og øllum øðrum jødum í USA. Stutt áðrenn valið hevði tann veruligi Lindbergh nevniliga alment ákært jødarnar fyri sjálvsøkið at kroysta USA út í eitt meiningsleyst kríggj. Ein av fyrstu uppgávunum hjá nýggja forsetanum verður at fáa í lag eina "semju" við Hitler, hvørs jødahatur Lindbergh tóktist at góðtaka uttan trupulleikar.

Í eini óhugnaliga sannlíkari frásøgn lýsir Roth, hvussu tað kendist hjá sær og síni familju at liva í jødahatska skugganum av valskeiðinum hjá Lindbergh, har jødafamiljur høvdu alla ørsøk til at vænta tað ringasta.

Byrjarar kunnu gleða seg til, at høgt metta skaldið Philip Roth neyvan hevur verið meir atkomiligur enn í *The Plot Against America*, samstundis sum kennarar skíra bókina eitt meistaraverk – og halda tað vera tíð uppá, at Roth fær Nobel-virðislønina.

Bókin kemur út á donskum í næsta mánað.




